# Blástur norðaneftir

**Umleið 20 ungfólk hittust á Eiði til messingvikuskifti. Tey ætla sær til Noregs á konsertferð í summar**





Edvard Joensen

Tað blásti á Eiði um vikuskiftið. Høgættin lá so trá og helt øllum í sínum jarntaki, so tað ýldi millum húsini og gav endurljóð í loranmastrini, sum sendi sínar melankolsku tónar oman til teirra., sum vildu lurta.

Men eisini aðrir, og meira skipaðir, tónar hoyrdust á Eiði. Tað vóru ungfólk úr Havnar Ungdómshornorkestri, sum vóru á venjingarlegu í Eiðis Skúla saman við venjaranum Kenneth Jones. Hesi fólkini hava tað til felags, at tey blása í messingljóðføri og eru skipað í felag, sum hevur til endamáls at fáa nýtt fólk í verandi hornorkestur.

## Ung lei›sla

Tað situr ein ungur drongur við eini trombone í venjingarhølinum. Hann vísir venjarin okkum til, tá sagt verður, at Yngd biður um eitt prát.

Dávur Juul Magnussen er 14 ára gamal og formaður í Havnar Ungdómshornorkestri. Hann sigur okkum, at nevndin er mannað við fýra limum. Umframt hann sjálvan eru Tróndur Herason úr Havn og Ragnar Djurhuus úr Kollafirði, sum báðir spæla í orkestrinum. Og so venjarin, Kenneth Jones, sum er walisari og musikskúlalærari í Føroyum. Hann er kassameistari.

Dávur greiðir frá, at Havnar Ungdómshornorkestur hevur havt tvær slíkar venjingarlegur fyrr, og at tær hava eydnast væl. Hetta gevur líkasum eitt eyka skump til teirra, sum frammanundan hava hug at spæla, sigur hann. Og endamálið er heilt greitt at hækka støðið hjá teimum, sum spæla, soleiðis at tey seinni nær sum helst kunnu sleppa upp í tey verandi hornorkestrini í landinum.

Sjálvur spælir Dávur í Havnar Hornorkestri. Og tað hóast tað bert eru eini tvey ár, síðan hann byrjaði at spæla. Teir eru tríggir úr Ungdómsorkestrinum, sum spæla í Havnar Hornorkestri, sigur hann.

Dávur greiður frá, at hesi sonevndu messingvikuskiftini eru fyrst og fremst venjingarlegur, sum enda við eini konsert. Men tað er eisini nakað sosialt í einum slíkum tiltaki, sigur hann. Fólk hugna sær og takast við ymiskt annað enn bara tónleik. Til dømis vóru tey og svumu í Felagsskúlanum á Oyrarbakka leygardagin.

## Blanda›ur skari

Hóast tað er Havnar Ungdómshornorkestur, sum stendur fyri tiltakinum, eru eisini bygdarfólk við. Hesaferð varð tiltakið hildið á Eiði, tí onkrir blásarar úr musikskúlanum har skulu við á konsertferðina til Noregs í summar.Tað kemst av, sigur Dávur, at Ken, sum hann nevnir læraran, eisini er musikskúlalærari á Eiði og haðani kennir onkrar spælarar.

Tað krevur fígging, tá farast skal út at ferðast. Og vanligt er, at “hatturin fer runt”, tá ymiskt tiltøk eru, sigur Dávur.Til dømis hava tey onkuntíð selt lutaseðlar undir konsertum. Og tey hava havt tiltøk, har stuðlar kundu binda seg til at gjalda eitt ávíst krónutal fyri hvønn tíma, tónleikararnir spældu.

Dávur sigur, at tað tiltakið gav eitt sindur av pengum. Og tann, sum spældi longst ta ferðina, spældi í fimm tímar. Men hann væntar ikki, at tað veður gjørt aftur fyribils.

Dávur Juul Magnussen, formaður í Havnar Ungdómshornorkestri, sigur, at tey í løtuni eru 18 fólk í orkestrinum. Tá eru eiðisfólkini tald við, sigur hann. Og talan er, sum sagt, bert um messingblásarar. Dávur greiðir frá, at messingljóðføri eru tey, sum verða nýtt í teimum traditionellu hornorkestrunum. Har verða saxofonir ikki roknaðar við, sigur hann frá. Og hann metir, at tað krevur eina nærri frágreiðing, hví so er.

Nógv fólk halda, sigur Dávur, at saxofonin er messingljóðføri, tí hon er gjørd av sama tilfari sum hornini. Men so er kortini ikki, Hon verður flokkað saman við træblásarunum sum til dømis klarinettunum. Saxofonin hevur nevniliga blað, meðan hornini hava messingmundstykki. Saxofonin hevur eisini fleiri ventilar, enn hornini hava. Hon líkist klarinettini. Sera einfalt og lætt at skilja, tá kunnleikin greiðir frá.

Sjálvur ætlaði Dávur sær at spæla saxofon. Men hann fløktist eisini í hugtøkunum og teknaði seg til messingblásararnar hjá Musikskúlanum. Men honum dámar væl at spæla trombone, sigur hann. Um-framt spælir hann klaver. Men hann væntar ikki, at hansara framtíð fer at liggja í at vera tónkeikalærari. Hurðin fer upp, og onkur rópar inn í skúlastovuna, vit sita í, at nú byrja tey at venja. Dávur reisist, fer inn í eina aðra stovu og setist við trombonini. Tær svingandi sambarútmurnar, sum fylla skúlan á Eiði hendan illfýsna, sinasta leygardagin í januar, køva heilt stormduni fyri uttan og leiða hugin til lýggjari umhvørvi, har dansur og spæl eru stórur partur av lívinum hjá fólki.

